# SANDS BYGDARSAVN



Handilin á Grótteigum

**SANDS BYGDARSAVN**

Sands Bygdarsavn varð sett á stovn í 1988. Umframt búnaðin í Norðaru Koytu eigur bygdarsavnið eisini handilin á Grótteigum, Akselsa handil, bygdur í 1860 og var fyrsti úthandil hjá Mortensens handli á Tvøroyri. Eisini eigur savnið húsini hjá Lottu, sum eru áføst við húsini í norðaru Koytu.

Á hvørjum ári síðan 1998 hevur savnið givið út tíðarritið **Kvørnina**, við siðsøguligum tilfari úr allari sýsluni.







**SANDS BYGDARSAVN**
Norðara Koyta
í Koytu 8
FO 210 Sandi

Tlf. 220729
info@sandsbygdarsavn.fo
www.sandsbygdarsavn.fo

Opið er:
Frá 1. jun. – 1. sep., kl. 14.00 -16.00
mánadag til leygardag, sunnudag er stongt.

Annars eftir avtalu við
Sandoyar Kunningarstovu, tel. 222 078
info@visitsandoy.fo
www.visitsandoy.fo

Her eru framúrskarandi støð, sum eru eina vitjan verd T.D. Seltuvík, við søguni um Princippiu. Gálgin, uppiá Nípu við søguni um Runta.
Kirkjan, sum stendur omaná fimm øðrum fornum kirkjum, og onnur søgulig fornminnir.




Føroyaprent • Svanamerktur prentlutur 541 705



# NORÐARA KOYTA

betri

## SANDS FORNMINNAFELAG

Fornminnafelagið varð sett á stovn í 1986 og rekur Sands Bygdarsavn saman við Sands bygdarráði. Felagið hevur, síðan tað varð stovnað, skipað fyri fleiri tiltøkum: Altjóða kvæðaráðstevnu í samband við 200 ára dagin hjá kvæðasavnaranum Jóannesi í Króki, myndaframsýningum á Sandoyarstevnum, klædnaframsýning og leikuframsýning, 100 ára haldi fyri sjónleiki á Sandi og framsýning um ungmannafelagið Virkið á 80 ára degnum í 2003.





















## BYGDIN

Bygdin heima á Sandi man vera, sum navnið ber boð um, fyrsta pláss í oynni , har fólk hava sett búgv.

Búsetingin er í tveimum, eystan og vestan fyri Sandsvatn.

Eysan fyri vatnið eru Traðir og býlingurin á Sondum og vestan fyri er sjálv bygdin.

Fornfrøðiligar ransóknir við kirkjugarðin,á Sondum og Junkarinsfløtt prógva, at fólk

hevur búð her í 9 øld. Á Sondum er prógva, at fólk hevur búleikast har í 4-6 øld, og aftur í 7-8 øld.

Við kirkjugarðin eru funnar leivdir av tí, fornfrøðingar meta vera langhús, har eru somuleiðis funnar gravir, sum benda á, at tey jarðaðu hava høgt samfelagsstøði. Ein myntskattur er eisini funnin á staðnum, sum er eindømi í øllum Føroyum.

Sands bygd er í dag ein livandi nútímans staður, har fiskivinna og landbúnaðarvinna er berandi vinnuvegur.

## BÝLINGURIN

Orðið 'koyta' merkir ein lægd, og hyggur tú niður yvir býlingin, sært tú, at hetta er so.

Býlingurin í Koytu er gamal býlingur, og har hava helst verið fleiri hús í gamlari tíð.

Í jarðarbókunum kunnu vit staðfesta, at fólk hava búð har í 1584.

## BÚNAÐURIN

Hanus Jóannesarson, seinni nevndur Hanus í Koytu, bygdi húsini í Norðaru Koytu, sum nú eru ogn hjá Sands Bygdarsavni.

Hann búsettist har í 1812, flutti yvir í Traðir í 1832 og festi 6 merkra garð.

Í 1841 læt hann festið frá sær til sonin og flutti aftur í Koytu.

Síðani hava fólk búð í Norðaru Koytu til 1938.

Í 1988 keypti Sands Bygdarsavn húsini og fór undir at seta tey í stand, so gjørligt var hjá áhugaðum at síggja, hvussu eini vanlig hús hava sæð út, og hvussu fólk hava búleikast.

Húsini eru úr timbri og hava flagtekju.

Í húsinum eru seks rúm, umframt loft og hoyløða. Í húsinum er durur, køkur við spískamari, stova og tvey kømur.

Inni er framsýning av lutum, t.d. skómakaraútgerð, høvlar og onnur amboð.